STARV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B8

Vit søkja eftir 2 fulltíðar avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar í skiftandi vaktum til setan 1. mars 2009 ella eftir avtalu til og við 31. august 2009. Møguleiki er fyri lægri brøki.

**Arbeiðsøkið er í høvuðsheitum**
• røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar

**Krøv til umsøkjarar**
• prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
• fakligan áhuga í røkt og viðgerð av kardiologiskum sjúklingum
• góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
• eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
• fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
• innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
• kardiologiskar royndir
• kardiologiska eftirútbúgving

Vegna umvælingar verða sjúklingar og starvsfólk flutt á aðra deild frá mai til nov. 2009.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja 304500 til Poulu Jacobsen, deildarleiðara, lokal 6068, lspouja@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 16. februar 2009 kl.12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Med. amb. G3

Á G3 eru 2 føst størv á starvsbrøki 0,5 leys at søkja til setan 1. mars 2009 ella eftir avalu:

• eitt til røkt og viðgerð til ymiskar amb. viðgerðir, serliga sjúklingar innan hæmatologi

• eitt til røkt og viðgerð til ymiskar amb. viðgerðir, serliga sjúklingar innan rheumatologi

**Førleikakrøv**
• prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
• minst 2 ára kliniskar royndir
• fakliga vitan og royndir við røkt og viðgerð innan hæmatologi/ rheumatologi
• góð tvørfaklig samstarvsevni
• teldukunnleiki
• fleksibul og positiv

**Vit kunnu bjóða**
• eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
• skipað innleiðsla
• positivt tvørfakligt samstarv
• fakliga menning

Arbeitt verður í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja 304500 til Unnur á Dunga, deildarleiðara, lokal 6250, lsunndu@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 16. februar 2009 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Ergoterapeutur**
Umsóknarfreistin er 2. februar 2009 kl. 12.00

**Fysioterapeutur**
Umsóknarfreistin er 6. februar 2009 kl. 12.00

**Arbeiðsfólk og reingerðarfólk**
Umsóknarfreistin er 6. februar 2009 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo







**Á Landssjúkrahúsinum**
• er sjúklingurin í miðdeplinum
• eru umleið 200 seingjarpláss
• eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
• eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
• eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
• er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

# Føroyaprent søkir starvsfólk

## Skrivstovunæming

Føroyaprent Pf. søkir eftir einum skrivstovunæmingi m/k innan fyrisiting, at byrja skjótast gjørligt.

Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði, í eini skjótt vaksandi fyritøku, við mongum avbjóðingum. Á Føroyaprent er tú í góðum umhvørvi, við vinaligum starvsfeløgum.

Vit kundu hugsað okkum ein lærling, sum er vanur við at arbeiða við teldu, er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni.

• Lønin er sambært galdandi lærusáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sveinur Thomassen, fíggjarleiðara, telefon 355976, 594558 ella t-post: sveinur@foroyaprent.fo

Umsókn, við upplýsingum um útbúgving og møguligar royndir, verður at senda okkum skjótast gjørligt og í seinasta lagi 9. februar 2009.

## Ráðgeva/sølufólk

Til søludeild okkara søkja vit eftir einum ráðgeva m/k. Ráðgevin kemur saman við søluleiðara okkara at taka sær av samskifti við kundar okkara. Hevur tú royndir innan grafiska økið, er tað ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

**Vit hugsa okkum, at tú:**
• helst hevur eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
• hevur royndir við B2B sølu
• hevur lætt við at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar
• dugir at orða teg í talu og á skrift
• hevur lætt við at koma í samband við fólk
• hevur áræði, ert álítandi, nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
• hevur sum fremsta mál at fáa kundarnar at kenna seg nøgdar

**Arbeiðsviðurskifti**
Á Føroyaprent bjóða vit tær eitt mennandi umhvørvi. Tú fært eitt avbjóðandi starv, sum er at menna størsta grafiska virkið í Føroyum. Málið er sjálvandi ein sunnur øktur umsetningur.

• løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring ella skriva til Fríðálvur Jensen, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 355969 ella 594559, fj@foroyaprent.fo

**Umsóknarfreist 9. februar 2009.**

Føroyaprent er ein fyritøka í vøkstri, sum bjóðar allar vørur og tænastur innan grafiska uppseting av prentlutum, prenting og bókbinding. Føroyaprent er ein nýmótans fyritøka á øllum økjum. Føroyaprent hevur greiðan málsetning um at vera best á sínum øki, og setur ein heiður í at náa hesi mál. Tað veri seg innan tøkni, tænastuveitingar og starvsfólkaøkið.

Føroyaprent

Hoyvíksvegur 59 - Postsmoga 3118 - 110 Tórshavn
info@foroyaprent.fo - www.foroyaprent.fo - Tel. 31 45 55

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 706